## Býirnir líka dýrir

Tað vakti ans, tá grønlendski landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Palle Christiansen, í síðstu viku segði, at grønlendska sjálvsstýrið hevur ikki ráð til at halda lív í teimum nógvu bygdunum, og at tað tí er neyðugt at kanna, um tað hevði loyst seg betur at flutt fólkið av bygd inn í býirnar. Men Birger Poppel, sum saman við øðrum er í ferð við at kanna livikorini í tí arktiska økinum, vísir á, at sambært einari kanning frá nítiárunum kostaðu býarfólk tí almenna líka nógv sum fólk á bygd.



## Kappast við stuðul

Danska reiðarafelagið krevur, at útlendsk reiðaríir, sum fáa almennan stuðul, skulu avmarka sítt virksemi fyri á tann hátt at hjálpa øðrum reiðaríum ígjøgnum kreppuna. Tey donsku reiðaríini fáa ikki stuðul frá tí almenna, men tað fáa fleiri reiðaríir í hionum ES-londunum. Jan Fritz Hansen, varastjóri í danska reiðarafelagnum, sigur við blaðið Lloyds List, at reiðaríini, sum fáa almennan stuðul, mugu leggja nøkur skip ella skerja ferðaætlanina, so reiðaríir, sum ikki fáa almennan stuðul, kunnu fáa meiri farm at føra.

# Leggja til brots beinanvegin

**Arbeiðið at gera nýtt røktarheim yviri við Strond hevur verið boðið út millum arkitektar, og tað er Albert Isfeldt, sum í løtuni ger byggiskrá. Spakin verður settur í á vári komandi ár**



*Økið yviri við Strond er sera væl egnað til røktarheim. Tað liggur nær við Lágargarð og Tjarnargarð, og útsýnið yvir Nólsoyarfjørð er frálíkt*

RØKTARHEIM
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur verið drúgt at bíða, men fyrr í vikuni kunngjørdi landsstýrið so, hvussu pengarnir til røktarheimsbygging vórðu býttir. Og Tórshavnar kommuna fekk tillutað 44,8 milliónir, svarandi til 64 røktarpláss.

- Í kommununi er akutti tørvurin millum 70 og 75 pláss, og við hesum verður tørvurin so næstan nøktaður, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Arbeiðið at tekna røktarheimið er boðið út millum arkitektar, og býráðið hevur valt Albert Isfeldt at gera hetta arbeiðið.

- Gjørd verður nú ein byggiskrá við teimum ynskjum, sum býráðið hevur og teimum krøvum, sum nú einaferð hoyra slíkari bygging til, sigur Heðin Mortensen.

Tá hendan byggiskráin er liðug, verður arbeiðið at byggja røtkarheimið yviri við Strond so boðið út.

- Talan er um so mikið stórt arbeiði, einar 90 milliónir, at tað ber ikki til at avmarka okkum til byggiharrar í kommununi. So arbeiðið verður allarhelst boðið út alment, ikki bert í Føroyum, men eisini uttanlands, sigur Heðin Mortensen.

Arbeiðið at gera eitt røktarheim yviri við Strond hevur ligið í kortunum leingi, men fíggjarliga trongu tíðirnar gera, at kommunan ikki hevur sæð seg føra fyri, at fara undir hetta arbeiðið einsamøll. Men nú stuðulin frá landinum er játtaður, verður arbeitt skjótt.

### Liggur væl fyri

- Vit hava fingið játtan til 64 pláss, og hvørt búpláss fær 700.000 krónur frá landinum. Hina helvtina rindar kommunan so sjálv, so talan verður um eitt arbeiði til einar 90 milliónir krónur, sigur Heðin Mortensen.

Fyrireikingar arbeiðið hevur verið í gongd í longri tíð, og í býráðnum er breið semja um at røktarheimið skal gerast.

Boðanesheimið, sum Jógvan Arge hevur navngivið røktarheimið, verður nú boðið út sum heildarveitan. Tað vil siga, at ein einstakur byggiharri fær arbeiðið um hendur og útvegar so sjálvur undirleverandørar.

Miðað verður ímóti at seta spakan í á vári 2010.

- Staðið yviri við Strond liggur sera væl fyri at byggja røktarheim á. Beint omanfyri er Lágargarður og nærhendis er eisini Tjarnargarður, so tað verður lætt at samskipa tænastur og tilboð til búfólkið á hesum heimum, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin sigur, at alt býráðið er spent upp á at fara í gongd, og roknað verður við, at Boðanesheimið stendur liðugt og klárt at flyta inn í um eitt til hálvtannað ár.

# Góð eru gomul minnir

**Oddfríður Gregersen var við á túrinum hjá Smyril Line til eysturlandið í Íslandi, og hann er sera fegin fyri túrin. – Eg fór við fyri at uppliva gomul minnir, sigur Oddfríður Gregersen**



*Oddfríður Gregersen avmyndaður umborð á Norrönu á túrinum hjá Óla Jacobsen til eysturlandið í Íslandi*
*Mynd: Leo Poulsen*

Á SLÓÐINI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað vóru ikki allir, sum kendu Bakkafjørðin frá útróðri, og ein teirra var Oddfríður Gregersen. Men ókendur var hann heldur ikki.

- Nei, ikki heilt ókendur. Eg var við Boðasteini og fiskaði sild við snerpunót í 1946, og tá landaðu vit á Seyðisfjørðinum. Men tann fabrikkin er burtur nú, so har sæst eingin farvegur til hana, sigur Oddfríður Gregersen.

Hann hevur eisini verið á landi á Bakkafjørðinum.

- Ein dagin tað var óveður, lógu vit út fyri Bakkafjørðinum, og tá settu vit bátin út og fóru í land at heilsa upp á fólk, tí tað vóru nógvir mans við, ið vóru væl kendir á Bakkafjørðinum. Tað var so fyrstu ferð, at eg var har, sigu Oddfríður Gregersen.

Hann heldur, at tað var áhugavert at síggja alt aftur, tó at nógv er broytt.

- Har vóru eingi hús eftir frá tí tíðini, kanska eitt, sigur Oddfríður Gregersen.

Júst tá manningin av Boðasteini var á Bakkafjørðinum vóru eingir føroyingar har, og tað vóru menn av skipinum, sum vóru kendir har, ið tóku stig at fara í land.

Serliga skiparin var væl kendur har, og vit vóru allir inni hjá einari konu og fingu kaffi, hugsi vit mundu vera einir 12 mans, sigur Oddfríður Gregersen.

- Hetta var í 1946, og hann hevur ikki verið har aftur, fyrr enn nú við ferðalagnum hjá Óla Jacobsen.

### Stak hugnaligt

- Hjá mær var tað fyri at síggja Bakkafjørðin aftur. Tað er eitt ungdómsminni hjá mær, og hesin túrurin ljóðaði so innbjóðandi, sigur Oddfríður Gregersen.

Eisini Oddfríður er sera fegin um túrin og um áhugaverdu frásagnirnar hjá Óla Jacobsen.

- Hann hevur klárað tað stak væl. Bara tað at fáa ein slíkan túr í lag er stórarbeiði, og eg haldi, at nógvir av hesum monnunum hava Óla nógv at takka fyri, at hann gjørdi hendan túrin, sigur Oddfríður Gregersen.

Tað vóru lutfalsliga nógv gøtufólk við á túrinum, bæði menn og kvinnur, men um tað var Óli Jacobsen, sum gjørdi tað, ella áhugin bara er so stórur í Gøtu fyri farnum tíðum í Íslandi, dugdi Oddfríður Gregersen ikki at siga.

- Túrurin í síni heild var sera væl eydnaður. Tað hevur verið hugnaligt, eisini at hitt fólk og práta við fólk, sum man ikki hevur sæð í nógv Harrans ár, sigur Oddfríður Gregersen.

Hann angrar á ongan hátt, at hann valdi at gera túrin.

- Hetta hevur verið ein stak hugnaligur og áhugaverdur túrur allan vegin ígjøgnum, staðfestir Oddfríður Gregersen.